Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæri maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

Esmann Jacobsen
Syðrugøtu

doyði og varð jarðaður.

Takk til prest fyri góð og troystarrík orð í heiminum og í kirkjuni. Takk til kirkjutænarar, sangarar, gravarar og berarar. Takk til tykkum, ið sendu blómur, kransar, gávur og heilsanir, og tit, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað. Ein serlig tøkk til Eivør Pálsdóttir og Felagskórið Gøta/Leirvík. Takk til øll tykkum, ið veittu so stórfingna hjálp í heiminum og í kirkjukjallaranum. Eisini ein serlig tøkk til øll tykkum, sum komu á gátt á hansara 80 ára degi, og annars meðan hann var sjúkur.

Fyri tey avvarðandi
Gunnleyg, Sigrun, Sigvør og Jóan Pauli

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri samkenslu, sum okkum varð víst, tá kæra kona mín, mamma, omma og langomma okkara

Hansina Olsen
Hvalvík

doyði og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til tykkum heimasjúkrasystrar og heimahjálpir, sum vóru so væl um hana til tað seinasta. Eisini ein tøkk til tykkum á B6. Tøkk til tykkum, sum vitjaðu inn á gólvið, og til tykkum, sum ringdu til okkum. Tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk fái øll tit, sum sendu gávu til Hvalvíkar kirkju. Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar, gravarar og berarar og til øll tykkum, sum fyldu henni til hennara seinasta hvíldarstað. Tøkk til tykkum, sum tóku tykkum av ervinum og annars øll, sum hjálptu til við jarðarferðini.

Vegna tey avvarðandi
Jóannes, Helgi, Tummas, ommu- og langommubørn

Tøkk

Hjartaliga takka vit skyldfólki, vinum og øllum tykkum, sum sýndu hjálpsemi og samkenslu, tá ið kæri pápi, verpápi og abbi okkara

Jaspur Svødstein
Klaksvík

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur,
og tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.
Gud signi tykkum øll.

Familjunnar vegna
Bárður og Rógvi

Heilafelagið havt aðalfund

Jógvan Telling Joensen. Myndin er frá tiltakinum á Torginum í SMS í sambandi við fimm ára dagin hjá Heilafelagnum

HEILAFELAGIÐ
Tíðindaskriv

Heilafelagið hevði aðalfund 11. mai í ár. Tíverri vóru ikki so nógv fólk á fundi, ein orsøk var helst verkfallið. Á fundinum segði nevndin frá arbeiðinum, ið gjørt er síðsta árið, serliga um arbeiðsbólkin, ið heilafelagið hevur sett at kanna viðurskiftini hjá apopleksiraktum í Føroyum og tilboðini, ið eru til teirra.

Nevndarval var eisini á skránni. Fyri vali stóru Paula Árnafjall, ið ikki tók við afturvali, og Annika Højgaard. Fyri Paulu varð Ingrid Henriksen vald.

Nevndin í Heilafelagnum sær nú soleiðis út:
Tórunn Guttesen, forkvinna
Jógvan Telling Joensen, næstformaður
Ingrid Henriksen, kassameistari
Annika Højgaard
Helena Fríheim

Eykalimir eru:
Marius Johansen
Marjun Olsson

Í ár gjørdist Heilafelagið fimm ár, og í hesum sambandi vóru tey á torginum í SMS. Har høvdu tey mattombola, framsýning og framførslur.

– Vit eru sera takksom fyri tann dygga stuðul, vit fingu á hesum degi, sigur Heilafelagið í tíðindaskrivi. Fyrsta tiltakið á skránni hjá Heilafelagnum verður nú árligi Gjáartúrurin, ið verður 6. til 8. september.

Danska Dreingjakórið konsert í Fuglafirði

Í annaðkvøld, sunnukvøldið, hevur Det Danske Drengekor konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði

KONSERT
Tíðindaskriv

Seinasta konsertin hjá Det danske drengekor verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði sunnukvøldið kl. 20.

Hesa vikuna er Det danske Drengekor og vitjar. Kórið fer av aftur landinum mánadagin 1. juli. Tað er Sten Lindholm, sum stjórnar kórinum.

Hetta er á øðrum sinni, at kórið er á konsertferð í Føroyum, og hetta er 31. ferð, at Sten Lindholm er í Føroyum.

Sten Lindholm er navnframur kórmaður og hevur stóran tokka til Føroyar.

Hann vitjar mong kór kring Evropa sum gestakórleiðari. Hann hevur leitt Det danske Drengekor 10 tey seinastu árini.

Kórið hevur konsert í Kristjanskirkjuni í Klakskvík í dag, leygardagin kl. 19, og seinasta konsertin á hesum sinni verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði í annaðkvøld, sunnukvøldið 30. juni kl 20.

Hetta verður fyrsta konsertin í hesum skála, eftir at húsið er tikið alment í nýtslu, har tað nýggja Stainwayflyglið verður roynt í kórhøpi.

Skráin hjá dreingjakórinum er fjølbroytt. Frá klassiskum løgum, jassi og gospel til litfagran norðurlendskan kórtónleik. Ein jasstrio spæir undir, sum letur kórløgini í ein sera ljómríkan búna.

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum mintust okkum við forbøn, vitjanum, uppringingum, gávum og stuðli ígjøgnum okkara sváru tíð; eina serliga tøkk vilja vit senda okkara lækna, starvsfólki á B6 og 7, tykkum sum vóru um Mariannu á Ríkissjúkrahúsinum, og eisini tykkum á Sjúklingahotellinum Tórshavn, har vit komu at búgva í langa tíð. Eisini vilja vit takka Øssuri Berghamar v/ fl. fyri trúfasta vitjan, og fyri tey góðu orð, hann hevði í kapellinum.
Somuleiðis takka vit øllum tykkum mongu, sum hjálptu til tá ið kistan við

Mariannu Joensen
Gøtueiði

kom heim og varð jarðað. Og takk til tann stóra skaran, sum fylgdi henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold; eina serliga tøkk til tykkum, sum skipaðu fyri máltíðini týskvøldið heima, og til tykkum, ið tóku tykkum av ervinum. Takk fyri kransar, blómur og allan peningastuðul til »Kelduna«.
Má Harrin ríkiliga vælsigna tykkum øll.

Fam. vegna
Birgitta og Jonhard

Keyp lyklar og vinn tveir skutarar

EYDNUSPÆL
Tíðindaskriv

Í sambandi við Varmakeldustevnuna, er ítróttarfelagið í Fuglafirði farið undir eitt tiltak við slagorðunum: »Keyp lyklar og vinn tveir skutarar«.

Eydnuspælið er sera einfalt. Tú kanst keypa tær ein ella fleiri lyklar. Lyklarnir kosta 50 krónur hvør. Tveir av hesum lyklum passa til tvey lás, sum tveir skutarar eru læstir við. Tey hepnu, sum ogna sær røttu lyklarnar, vinna skutararnar.

Lyklarnir kunnu roynast í lásunum á skutarunum, sum standa á tivoliøkinum sunnudagin 7. juli millum kl. 18. og 22. Lyklarnir fáast til keyps hjá Haraldsen, hjá Annu og í FK í Fuglafirði og á Shellstøðini í Gøtudali.

Eisini selja umboð fyri ÍF lyklar meðan stevnan er.

Fyri hvønn keyptan lykil fært tú eisini ein lutaseðil við tíggju vinningum á. Høvuðsvinningurin á lutaseðlinum er tveir APEX flogferðaseðlar, Vágar-Keypmannahavn og aftur frá Fonn Flogi. Hinir vinningarnir eru eitt lamb og gávukort á 1000 og 500 krónur. Drigið verður um hesar 10 vinningarnar sunnukvøldið 7. juli kl. 23.30 við Bókasavnið.

List í Ribarhúsi

LISTAFRAMSÝNING
Tíðindaskriv

Íslendski listamaðurin, Bjarni Joensen frá Þorláksshøfn, sum er av føroyskari ætt, sýnir fram oljumálningar í Gallarí Ríberhús í Fuglafirði í døgumun frá 28/6 til 3/7.

Dupultir sjussar á fløsku í Rúsuni

Tað er nýtt og smart í londunum rundan um okkum. Hósdagin stóð tað fyrstu ferð í Rúsuni, og í gjár var tað longu útselt. Bacardi Breezer og Smirnoff Ice eru komin til landið, og áhugin fyri nýggju vørunum í Rúsdrekkasølu Landsins er eftir øllum at døma stórur

NÝGGJ VØRA
Rúnar Reistrup

Eftir at hava fingið eina rúgvu av áheitanum frá vanligum viðskiftafólkum og frá skeinkingarstøðum hevur Rúsdrekkasøla Landsins avgjørt at innflyta eitt nýtt slag av rúsdrekka, nevniliga liðugt blandaðar sjussar í smáum fløskum.

Hetta slagið av rúsdrekka, sum nógvir føroyingar hava sæð í lýsingum á útlendskum sjónvarpsrásum, er blivið ógvuliga væl umtókt í eitt nú Danmark eftir stuttari tíð.

– Tað vísir seg serliga at vera ung konufólk ið dáma væl hesar vørurnar, sigur Rúni H. Olsen, innkeypsleiðari á Rúsdrekkasølu Landsins.

Tey tvey vørusløgini av liðugt blandaðum sjussum, nevnd Bacardi Breezer og Smirnoff Ice, sum Rúsdrekkasøla Landsins hevur fingið heim, eru í alkoholstyrki at líkna við eina gulløl. Í hvørjari fløsku eru einir 4cl av sterkum og restin av fløskuni er fylt upp við sodavatni og smakkievnum.

Stórur eftirspurningur

Á Rúsdrekkasølu Landsins høvdu tey upprunaliga ikki ætlað at tikið hetta nýggja slagið av rúsdrekkavøru heim. Hildið varð ikki at hetta var neyðugt at selja í Føroyum.

– Men Rúsdrekkasøla Landsins skal sambært endamálsorðingini taka føroyska eftirspurningin til eftirtektar í samansetingi av vøruúrvali, og vit hava upplivað so stóran eftirspurning eftir hesum vørunum, at vit hava avgjørt at taka eina sending heim sum eina royND, sigur Rúni H. Olsen.

Tann royndin hevur staðfest, at eftirspurningurin er stórur, tí longu sama dag, sum vørurnar komu í handilin, varð Smirnoff Ice útselt, og væntað varð, at Bacardi Breezer fór at verða útselt einaferð friggjadagin.

– Skeinkistøðini hava víst sera stóran áhuga fyri at sleppa at selja nýggju vørurnar, og tey hava keypt nógv til goymslurnar, sigur innkeypsleiðarin.

Til tey heilt ungu

Í Danmark hava nógvar ávaringar ljóðað ímóti hesum nýggju vørunum, ið smakka so at siga sum sodavatn, men eru sterkar sum gulløl. Millum annað hevur verið fórt fram, at hesar vørurnar eru gjørdar við teimum heilt ungu sum málbólki. Ætlanin hjá stóru fyritøkunum aftanfyri Smirnoff vodka og Bacardi rom verður søgd at vera at venja tey heilt ungu við rúsdrekka og við vørumerkini so tíðliga sum gjørligt.

Hesar ávaringar kenna tey á Rúsdrekkasølu Landsins, men meta ikki at tað er nakar vandi fyri, at tey heilt ungu fara at fáa hendur á søtu rúsdrekkavørunum.

– Her á landi er sølan so væl skipað at vit áttu ikki at havt tann trupulleikan. Tað er heilt greitt, at eingin undir 18 ár sleppur at keypa rúsdrekka frá okkum. Tá er støðan ein onnur í Danmark, har hesar vørurnar fáast í hvørjari kiosk, og har ikki verður fylgt so væl við um keyparin er nóg gamal at sleppa at keypa. Og harafturat skalt tú bara vera 15 ár fyri at keypa rúsdrekka í Danmark, sigur Rúni H. Olsen, innkeypsleiðari á Rúsdrekkasølu Landsins.

Dýrir dropar

Á stødd sum ein sodavatn og við styrki sum ein gulløl er greitt, at tær nýggju rúsdrekkavørurnar eru í beinari kapping við øl. Men hvat prísi viðvíkur kunnu nýggju vørurnar ikki kappast. Ein fløska av nýggju vøruni kostar ávikavist 23 og 27 krónur í Rúsdrekkasølu Landsins.

Ein av orsøkunum til høga prísin er, at vørurnar verða bólkaðar sum spiritus av tí at tær í botn og grund eru vodka og rom blandað við sodavatni. Spiritus er álagt hægsta avgjald og harafturat er vinningsprosentið hjá Rúsdrekkasøluni hægst á spiritus í mun til aðrar rúsdrekkavørur.

Men prísurin sær ikki út til at halda keyparunum aftur í fyrstu atløgu. 1320 fløskur vórðu bílagdar heim í fyrstu sending, og tær eru seldar nú. Týsdagin í komandi viku kemur næsta sending av vøruni. Hesuferð hevur Rúsdrekkasøla Landsins bílagt fýra ferðir so nógv.

Eitt av skeinkistøðunum, sum hevur lagt inn undir seg av nýggju vøruni, er diskotek Platform í Havn. Har var vøran fyrstu ferð at síggja á hillunum í nátt.

Pakkihjálp
til slaktaran í SMS

Slaktarin í Miklagarði í SMS søkir eftir fólki at byrja skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er sett til 30 tímar um vikuna.

Løn eftir avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til slaktaran í Miklagarði, tel. 31 52 62 og spyr eftir Jørgen Jørgensen.

Miklagarður er størsti matvørurhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 vørunummrum. Í Miklagarði starvast uml. 80 fólk.

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 52 62